# Arbeiða við fótbóltshøll í Sandavági

**Á bygdarraáðsfundi í Sandavági hóskvøldið varð samtykt at seta nevnd, sum skal arbeiða við uppskoti um at byggja eina fótbóltshøll í Sandavági**

KOMMUNUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*



*Sandavágs Kommuna hevur samtykt at fara undir fyririekingar til at gera eina fótbóltshøll í niðurlagda grótbrotinum í Sandavági*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Sandavági:**
Uppskot er komið um at byggja fótbóltshøll í grótbrotinum norðanvert bygdina í Sandavági. Bygdarráðið er farið undir at fyrireika málið.

Á bygdarráðsfundi, sum varð hildin í Sandavági hóskvøldið, vóru heili tvey uppskot um at fraa undir at fyrireika fótbóltshøllina, sigur Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági. Fyrra uppskotið, sum var á skránni, kom frá Sandavágs Ítróttarfelag og FS Vágum í felag, og tað seinna kom frá bygdarráðsliminum Jóanisi Nielsen. Borgarstjórin sigur seg vita um enn eitt uppskot um sama mál, sum tó ikki var fyri á fundinum hóskvøldið.

Bygdarráðið samtykti at seta eina nevnd við limum, sum ítróttarfelagið og kommunan hvør í sínum lagi velur, at arbeiða víðari við hugskotinum.

Sandavágs Ítríttarfelag hevði við sínum uppskotið lagt ymiskt tilfar, sum fingið var til vega til tess at undirbyggja tað, sum skotið er upp.

Rósa Samuelsen, borgarstjóri, sigur, at hon hevur verið í samband við onkran arkitekt, sum millum annað hevur verið við til at gjørt nýggju Parkina i Keypmannahavn.

Men hon leggur dent á, at enn er einki gjørt ella nøkur avgerð yvirhøvur tikin annað enn, at samtykt er at seta nevndina, sum nú skal fara rættiliga undir arbeiðið við at fyrireika høllina.

# Stovna felag fyri frælsan ítrótt í Vágum

**Í umbúna er at stovna felag fyri frælsan ítrótt í Vágum. Stovnandi aðalfundurin verður hildin í Miðvági mikukvøldið**

ÍTRÓTTUR
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*



*Sólfríð Fjalsbak hevur tikið stig til at stovna felag fyri frælsan ítrótt í Vágum. Stovnandi aðalfundurin verður í Miðvági mikukvøldið*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Miðvági:**
Gongst sum ætlað, verður nýtt ítróttarfelag stovnað í Vágum mikukvøldið. Talan er um felag fyri frælsan ítrótt, sum skal vera fyri alla oynna.

Talan er um at stovna felag fyri frælsan ítrótt fyri á tann hátt at kunna luttaka í føroymeistarakappingunum fyri frælsan ítrótt, sum eru á hvørjum ári, sigur stigtakarin til nýggja ítróttarfelagið í Vágum, Sólfríð Fjalsbak í Miðvági.

– Tað er nevninliga soleiðis, sigur hon, at fyri at kunna taka lut í føroyameistarkappingunum, skal ein vera limur í einum felag, sum so aftur er limur í serambandinum fyri frælsan ítrótt í Føroyum. Vit vita at tað eru nøkur fólk í Vágum, sum íðka frælsan ítrótt á kappingarstøði. Og tey noyðast so at vera limir í feløgum aðrastaðni í landinum. Serliga man tað vera Bragdinum, tey eru limir í, sigur hon.

Sólfríð Fjalsbak sigur, at hon hevur spurt seg fyri hjá sersambandinum, og hevur har fingið at vita, at tað helst fer at taka ein mánað ella so at fáa felagið skráset í sersambandinum, eftir at nýggja felagið er stovnað.

Føroyameistarakappingin í renning byrjar við flaggdagsrenningini í Havn og heldur so fram á øllum stevnunum. So um tað skal bera til at vera við til allar kappingarnar í summar, er neyðugt at stovna felagið sum skjótast, sigur hon.

Enn eru hvørki høli ella venjingarstøð fingin til vega til nýggja felagið. Byrjað verður bókstaviliga á berum, sigur Sólfríð Fjalsbak.

Hon sigur seg bert hava fingið positiva móttøku, har hon hevur tosað um felagið. Tá tað er stovnað, fer hon fyrst at royna at fáa samstarv við hini ítróttarfeløgini í Vágum um til dømis at sleppa at renna kring fótbóltsvallirnar at byrja við. Tí tað verður ivaleyst renningin, sum verður tað fyrsta, felagið fer undir, væntar hon.

Síðan er at fáa lagt fastar tíðir fyri venjingini. Ætlandi skulu børn, vaksin og motionistar hava venjingartíðir hvør sær, heldur hon.

Stovnandi aðalfundurin av felag fyri frælsan ítrótt í Vágum verður hildin heima hjá Sólfríð Fjalsbak í Miðvági mikukvøldið 4. mars klokkan 20.30.

Væntaða nýggja felagið hevur einki navn, men fólk eru vælkomin við uppskotum til navn til nýggja ítróttarfelagið í Vágum, sigur stigtakarin.



# Nýggi Smyril á flot um 17 dagar



*Føroyska landsliðið í fótbólti var fyrsti, formligi gesturin umborð á nýggja suðuroyarskipinum. Tá ið landsliðið herfyri var í Spania á venjingarlegu, var alt ferðalagið á skipasmiðjuni og hugdi eftir nýggja Smyrli. Smyril er stórur og landsliðið rúgvar ikki nógv upp á dekkinum*



*Her stendur yvirbygnurin á nýggja Smyrli. Sjálv brúgvin skal setast á takið á yvirbygninginu. Beint undir brúnni eru manningarrúm og beint undir teimum, við teimum stóru vindeygunum, er matstova. Annars sæst, hvussu bakkin sær út*



*Her sæst yvirbygningurin aftani frá*



*Her sæst inn á forskipið við tí stóra kúlustevninum*




*Her er ein nærmynd av yvirbygninginum og her sæst, hvussu stórur hann er. Omaná yvirbygningin skal sjálv brúgvin setast. Beint undir brúnni við teimum smáu vindeygunum, eru kømur til manningina og onnur manningarrúm. Og tey stóru vindeyguni eru inn í eina matstovu*

**Arbeiðið at byggja nýggja Smyril gongur framvegis sum ætlað og 19. mars verður skrokkurin flotaður**

NÝGGI SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Arbeiðið at byggja nýggja Smyril gongur framvegis sum ætlað.

Og nú er dagurin farin at nærkast, har skrokkurin skal á flot.

Dagurin, tá ið skrokkurin skal á sjógv er ásettur at vera 19. mars.

Tað dámar kanska ikki teimum, sum eru full í pátrúgv, tí tað er ein fríggjadagur- men tað hugsa spaniólar ikki so nógv um og harvið verður tað.

Magnus Magnussen, tekniskur stjóri hjá Strandferðsluni, sum er í Spania og hevur eftirlit við bygginini, sigur, at tá ið skrokkurin er farin á sjógv, skal hann sleipast til eina aðra skipasmiðju hjá sama felag, har yvirbygningurin skal setast omaná.

Síðani verður farið at innrætta skipið og í oktober verður hann latin Strandferðsluni.

Magnus Magnussen sigur, at Smyril hevur annars longu havt sínar fyrstu almennu gestir umborð.

Tað hendi, nú landsliðið í fótbólti var niðri í Spania, at teir vóru á skipasmiðjuni og hugdu eftir nýggja suðuroyarskipinum.

Teir vórðu eisini avmyndaðir á dekkinum og tann myndin skal rammast inn og hongjast onkustaðni umborð.

Annars sigur tekniski leiðarin á Strandferðslsuni, at arbeiðið hevur gingið rættiliga væl og at tað er onki sum bendir á, at tíðarfreistirnar ikki fara at halda.

Tó hava onkrir dagar eisini verið, har ið arbeiðið hevur verið darvað av arbeiðsósemjum í skipasmiðjuni, men tað hava bara verið einstakar dagar.

Og tá ið arbeiðsósemjur eru í suðurlondum, gongur tað munandi harðari fyri seg enn her hjá okkum og ta einu ferðina komu arbeiðsfólk á skipasmiðjuni í rættiligan bardaga við løgregluna. Og tað endaði við, at løgreglan brúkti táragass ímóti verkfalsfólki og skeyt tey við gummikúlum uttan fyri portrið til skipasmiðjuna.